# til Suðuroyar



Í Fámjins kirkju hongur Føroya søguliga tjóðarmerkið

við dýrdarveðri og sólskini av heiðum himni allan dagin til seint á kvøldi.

Tá ið Smyril legði at landi á Tvøroyri nakað eftir middag, stóð bussur frá ferðaheiminum fyri okkum, og eftir stuttari løtu komu vit vegin fram til gistingarhúsið í Øravík. Har hittu vit tveir av teimum, sum nú komu við okkum og seinni kom hin triði eisini. Hann er lamin og sat tí í koyristóli, men vit fingu at vita, at hesin maður, Poul Michelsen á Tvøroyri, var hann, sum fyri nøkrum árum síðan hevði fingið til vegar lista yvir allar menninar, sum fóru til Íslands í 1941. Hetta søguliga skjal hansara kom í Sosialin nr. 31 í ár, og tað er hesin maður, sum var upprunin til hugskotið at finnast aftur. Annar maður er ein av arbeiðs-formonnunum í Íslandi, Karl Jespersen av Tvøroyri. Hann er nú u. 90 ár, men kortini enn sum áður umhugsin í samfelagsmálum og lesur eisini tíðindabløð úr Íslandi eins og okkara egnu. Kendur er hann sum álitis- og oddamaður langt áramál í »Fylking« og veit um mangt takið at siga í lønarmálum. Tað var sera áhugavert at hitta henda mann aftur eins og allar hinar eisini.

Vit kendu okkum beinanvegin sum heima í Øravík. Fyristøðufólkini gjørdu sítt alrabesta og innanhalla vóru heimlig høli bæði uppihaldsrúm sum matarhøll og náttklivar. – Tá ið vit høvdu fingið ein bita undir tonnina og heitt niður á hjartað og eisini prátað saman eina løtu, varð farið við bussi suður eftir oyggj. Og tað má sigast, at hjá honum, sum ikki hevði verið her um vegir fyrr, gjørdist túrurin bygd úr bygd sera áhugaverdur og hugtakandi, klárviðrað og sólskin alla tíðina. – Vit endaðu í Sumbiartunlinum og komu í syðstu og søguríku bygdina Sumba.

Hann, ið sum ungur las Sagnir og Ævintýr eftir Jákup Jakobsen, men ikki hevur verið á ferð her fyrr, fær mangt at hugsa um, tá ið ein fróðarmaður sum Thorbjørn Lisberg situr í bussinum og greiðir frá, tí almikið er at siga frá um kend støð og staðarnøvn og um minniligar tilburðir o.s.fr. Her skal bert verða nevnt, at tá ið ein fær at síggja forna landnáms- og offurstaðið Hørg í Sumba og síðan lítur út at Holminum og haðan út í hav og eftir tað kemur niðan á hitt navnframa Beinisvørð og ikki at gloyma hitt forna søgu- og sagnkenda Akrabyrgi, tá er tað, eins og Føroya túsundára gamla søga gerst livandi og veruleikanær.

Um ferðina er annars at siga, at tíðin varð væl nýtt. Eisini dagin eftir koyrdu vit í bili, nú serliga til kend støð á Tvøroyri og í Froðba. Vit náddu norður at Hvalbøar tunlinum, men komu ikki norðurum. Allastaðni kundu síggjast vælhildin heim og ruddiligir býlingar. Serliga kom einum fyri øll tann slætta og grasgóða innangarðsjørðin eins og somuleiðis víð og góðkendi uttangarðs bæði her og mangar aðrarstaðir sum neyvan finnst betri her fyri norðan.

Tá ið farið varð norður aftur við Smyrli u. fýratíðina, vóru luttakararnir á einum máli um, at ferðin hevði verið góð og væleydnað. Eina stóra tøkk fær Thorbjørn fyri hansara ómak og somuleiðis hjálparmaður hansara á Toftum, Jákup Michael. Men serliga siga allir luttakararnir fyri-støðufólkunum á gistingar-húsinum stóra tøkk fyri góða móttøku og heimligt tilhald.

At enda skal her eitt ynski verða framborið um, at hin nýggi Smyril skjótt kann koma at knýta Suðuroy tættari at okkum her norðuri, og at framtíðin gerst holl við bjørtum vónum og framgongd.

## Myndir úr Íslandi 1941



Standandi nr. 2 frá vinstru er Karl Jespersen, ið var ein av arbeiðsformonnunum. Sitandi nr. 1 frá vinstru er Poul Michelsen á Tvøroyri og honum við lið Eli Bech, bygdarmaður hansara, sum saman við pápa og bróður sínum gekk burtur á útróðri undir Íslandi í 1944.



Frá vinstru: Tórstein av Sandi, Tummas úr Hesti, Johan av Sandi, Karl Jespersen, formaður, Martin av Sandi og Dánial úr Hesti.



Nr. 1 frá vinstru er Bernhard Joensen, Gjógv, sum var kvartermeistari. Nr. 5 frá vinstru er Ábraham Ábrahamsen av Strondum, sum var ein av arbeiðsformonnunum